Dimmalætting

Stovnað 1878
Ábyrgdarblaðstjóri: Beate L. Samuelsen
Blaðstjóri: Ingi Samuelsen
Tilgerð: FVF Dimmalætting
Prent: Dimmalætting

AVGREIÐSLA Mánad til hósd. kl. 8.00-17.00. Frygsad kl. 8.00-16.00. Levgard stongt. Tlf. avgreiðsla kl. 8.00-16.00. Tlf. 311212. Fax 310941. Smyrilsvegur 13. Postboks 19, FO-110 Torshavn
e-mail: redaktørin@[illegible]
[illegible] fo, bakhuldreimma fo, kronikkreimma fo, videkrin@[illegible]

INNLATINGARFREIST FYRI LÝSINGAR

	Tysdagsblaðið	Mikudagsblaðið	Hósdagsblaðið	Friggadagsblaðið	Leygardagsblaðið
Stórn lýsingar	fri kl. 12	mán kl. 12	tys. kl. 12	mik. kl. 12	hós. kl. 12
2 lg tekstlýsingar	má kl. 10	tys. kl. 10	mik kl. 10	hós. kl. 10	fri kl. 10
Okkara Gulu	fr. kl. 15		tys. kl. 15		hós. kl. 15

Lýsingar, ið nógv arbeiði er av, mugu vera inni í góðan tíð
Lítlýsingar og lýsingar við framhjáplássi skulu bileggjast í góðari tíð.

Vanligar treytir: Síðustødd: 8 teigar á 41x515 mm. 1/1 síða 4.160 mm. Ólsjónd Lýsingar, sum eftir blaðsins meti kunnu misnokast fyri blaðtilfar, skulu merkjast við orðinum: Lýsing, sum verður náknað upp. lýsingarmátið. Orðið INSERAT verður ikki góðtikið. Innlatingarfreist fyri lýsingar: Sæst á skemanum til vinstru.

Fyrivarni: Innihaldið í lýsingunum má ikki stríða móti galdandi lógum. Ábyrgdin fyri hesum hevur lýsarin. Blaðið tekur sær rætt til at sýta at taka lýsingar við, sum blaðið metir óynskilar.

Teknisk viðurskifti og umbrugvan fyri lesarum og lýsarum ger, at blaðið má tilskila sær rætt til at:
1. gera smærri týdningarleysar broytingar í lýsingum hvat tekstí og uppsetan viðvíkur.
2. skjótta út eina lýsing til seinni blað. Lítlýsingar kunnu bert takast við, um teknisku viðurskiftini loyva tað.

Endurgjald fyri møguligar villur, sum lýsarin sjálvur ikki hevur skyldina fyri, er vanliga prísavláttur eftir blaðsins meti um viðvirkninkan av lýsingini, men í mesta lagi at lýsingin, ella liknandi lýsing, verður tikin við aftur seinni ókeypis. Villur, sum standast av vánaligum lýsingartilfari hevur blaðið onga ábyrgd av.

Lýsingar, sum verða inntelefoneraðar, verða altið lisnar uppaftur, og blaðið tekur tí onga ábyrgd fyri villur, sum koma á henda hátt.

Størri oljutrúvirði

AT útlendskar oljufyritøkur framvegis vísa áhuga fyri Føroyum hóast kreppu við eftirfylgjandi endurgjaldi, ger, at vit krøkja okkum føst í, at vit ikki eru slept upp á fjall í eini møguligari oljuvinnu.

Tað visir seg, at hvørja ferð vit eru um at gloyma oljuna burtur, tá onnur meiri aktuell og viðkomandi mál eina løtu upptaka sinnini, gera oljufeløg vart við, at gongd er í hesi vinnu á føroyskum havøki.

Øll bíða vit eftir, at okkurt skal henda, og tá ótolnið tekur yvirhond, skal so lítið til, at vit leypa á leistum eftir øllum, sum ein møguleiki er fyri kann rætta búskapin uppaftur.

Hann er á veg upp, men skal tálmast, siga teir kønu,ið ikki allir eru á einum máli, hvussu vit skulu bera okkum at, skal hann ikki fara aftur hin vegin. Vit tóku ikki rættiliga undir við ávaringini fyri nøkrum árum síðani, tá aðrir serfrøðingar heittu á okkum um at vera varin. Støðan var so, at ikki skuldi nógv til, áðrenn samfelagið fór av um tvøran.

Tað hendi eisini. Men sum ein Guds gáva kom dreymurin um oljuna til okkara. Hann hava vit enn, hóast long tið er gingin, síðani fyrstu leitingarnar byrjaðu.

Ikki er oljudropin komin upp enn.

Tað ger heldur einki. Tí vit mugu vera væl fyrireikað, skulu vit hava ein kjans at fáa nakran vinning úr henni fyrstu 15-20 árini, ljóða oljuserfrøðingatíðindini.

Kommunur kappaðust serliga nógv eina tíð um at bjóða seg fram sum útgerðarhavn í sambandi við komandi oljuvinnuna.

Tað kostar ikki einki at búgva seg út til at taka ímóti eini oljuvinnu.

Íløgur skulu gerast. Av tí at kappingin er hørð millum kommunurnar, ber ikki til at selja eina slíka tænastu so bíliga, uttan at neyðugt er hjá oljuhavnini og harvið kommununi at tryggja sær, at inntøkurnar í longdini gerast størri enn útreiðslurnar. Tá ein tið er liðin, og tikið verður samanum, mugu avvarðandi myndugleikar á einum máli kunna staðfesta, at hetta var ein góð íløga, ið gjørd varð.

Trygdin aftan fyri ein sáttmála í sambandi við eina oljuútgerðarhavn má vera heilt greið. Eingin ivi má vera millum oljufeløg og kommunu, at tað er rætt, sum kommunan ger við at leggja alla sína orku í oljutænastuna. Annars endar galið.

Sostatt má tað vera ein stór og væl gjøgnumhugsað ætlan, ið løgd verður á borðið til góðkenningar, tá farið verður undir eina so stóra íløgu um hana, ið Tvøroyrar kommuna er farin undir at fyrireika á Drelnesi í hesum døgum.

Samstundis fær hetta okkum at trugva eitt sindur meiri uppá, at olja man vera í føroyskum havbotni, eftirsum oljufeløg framvegis hava stóran áhuga fyri henni, hóast tey eru eins tigandi og ein oystra, um hon, oljan, er har. Annars vóru tey ikki farin so langt sum at hugsa um tænastuna uppi á landi, og hvar skjótast er at sigla til lands fyri at spara óneyðuga siglingartíð.

Tøkkir

Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum sýndu samkensla, tá ið kæra kona, mamma, svigarmamma og omma okkara

Olga Sørensen
Øravík

doyði og varð jarðað. Takk til prest, sangarar, berurar og gravarar. Ein serstøk takk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt hjalptu til. Takk fyri blomur, kransar, heilsanir og til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Fyri tey avvarðandi
Mortan, Vónbjørt, Vónbjartur, Mirian og Tórun

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum gleddu okkum á hjunabandsdegnum 16. mai 1998.

Heilsan
Tatjana Johnsson og Jens Bagge
New York

Tøkk

Hjartaliga takk fyri sýnda samkensla við jarðarferðina hja góða manni mínum, papa, abba og verfaðir okkara

Pætur Hansen
(fødd 3. juni 1929, andaðist 9. mai 1998).

Tøkk øll somul.

Ása
Eyðun, Jóhan, Hanus og Fróði við familju

Yrkingar

Verserier

I indkøbscentret

Folk køber ind helt desperat.
Ved hvert et kasseapparat
ma samlebåndet løbe
Her går det godt – bevar mig vel!
Indtil man køber sig ihjel,
man lever af at købe!

Aage H.

Á útróðri

Lag: Land mitt har grasið í líðum grør

Stuttligt er at flota í dag,
tú trivur í eitt kvæðalag,
her føroyingar sigla um nøv og nes,
teir kenna væl hvørt áker og fles.

Bátar nú sigla um sund og hav,
teir fiska toskin, sum Gud teim gav,
so stuttligt er at flota her,
kring Føroya klettar, berg og áker.

Sigla a miðið og kasta brátt,
sum veðrið í dag gørdist lýtt og gott,
og fiskur er at fáa í dag,
tú trivur í eitt kvæðalag

Her hava føroyingar øld um øld
fiskað bæði morgun og kvøld
og róð um hav og sund og fles
og siglt um klettar, nøv og nes.

Nú man dagur liða brátt,
og skjótt man koma myrka nátt,
vit sigla inn á klett og stað,
og sólin setur um lið og bø.

Fongur var góður, vit fingu í dag,
tú trivur í eitt sálmalag,
veit Gudi takk fyri alt, hann gav,
for fisk, hann legði í sund og hav!

David Johannesen

Viðmerkingar

Evni til landsstýrissessirnar

Førleiki ella lokal- og vinapolitikkur?

Nu ein dagur hefyri, eg fekst við at lesa føroysku bløðini, kom eg fram á áhugaverda grein, sum segði fra, at ein av oddamonnunum hja Folkaflokkinum í Suðuroy hevði tikið seg úr floksarbeiðinum sum motmæli moti, at Folkaflokkurin ikki valdi landsstýrislim úr Suðuroyar valdømi.

Her skal ikki verða tikin støða til, um suðuroyingar eiga egnað folk til landsstýrið ella ikki – Páll Vang hevur í hvussu so er roynd'rnar – men ætlanin er heldur at nema eitt sindur við hugburðin í sambandi við evnir til landsstýrislimir.

Orsøkin til, at eg kom at hugsa um hetta, var, at eg sama dag hoyrdi ein tíðindastubba fra BBC, har sagt varð fra, at leiðarin í konservativu skuggastjórnini ætlaði at skifta eitt sindur av mannskapinum út fyri at endurnyggja skuggastjórnina. Tíðindafolkið segði eisini, at tað for helst ikki at vera lætt, tí mannfallið var so stórt hja konservativa flokkinum við seinasta val, at har var ikki so nógv folk við stórvegis royndum at velja imillum. Somuleiðis varð sagt, at neyvan for konservativi leiðarin at taka nyvald folk inn í skuggastjórnina, fyrr enn tey hevðu fingið eitt sindur av royndum í parlamentinum, og síðani eini tvey ar í skuggastjórnini, sum varaella hjálparráðharrar.

Hetta er ikki sami hugsanarhátturin sum hja politiku flokkunum í Føroyum, har tað mangan eru tey við ongum politiskum ella parlamentariskum royndum, sum fáa landsstýrissessirnar. Tað er sjálvandi eisini vanligt aðrastaðni at velja ráðharrar uttanifra – men ta er aloftast talan um fyrrverandi politikarar ella um folk úr floksfelagsskapinum við serligum fakligum kunnleika og royndum.

Fyri at verja demokratið, folkaræðið, er tað sera umráðandi, at fólk, sum fara í landsstyrið, vita, hvat tey tosa um. Tí fakfólkini í umsitingini eiga altið at fáa eitt kvalifiserað motspæl frá landsstyrsfólkunum, annars bliva tey landstyrisfólkini bara leir í hondunum á umsitingini.

Føroyar eru við at fáa eina viðkaða og væl utbuna umsiting, og tí er tað enn meira umráðandi, at tey, sum manna landsstyrið, kunnu vera fólksins verja moti einum reinum embættismannavaldi. Annars faa vit eina støðu, sum er hvaðna verri enn hon í BBC sendiráðini :Yes Minister!-.

Tað er onki at ivast í, at so hvørt sum umsitingin mennir seg, so fær hon meira vald og verður snildari í at nýta vald sitt – antin tí persónarnir beinleiðis vilja hava vald, ella tí at tey í umsitingini siggja niður a landsstyrsfólk, sum tey ikki halda vera bugvin til at umsita málaskini.

Sjálvandi er tað so, at tá nýggj landsstyrsfólk verða sett, so eigur umsitingin at stuðla teimum og at seta tey inn í málaskini – tí ongin er liðugt utbugvin landsstyrislimur, sum ikki longu hevur verið í landsstýrinum í minst eini tvey ar.

Men samstundis er tað umráðandi fyri fólkaræðið, at flokkarnir longu nu fara at leita eftir egnaðum fólki, sum skal manna eitt nytt landsstyri um fyra ar ella so. Tað er ov seint at fara at leita í seinastu løtu – og tað er málaliga ov tilvildarligt, sum tað hevur verið í minum flokki, at landsstýrisfólk verða heintað, bara tí at tey eru úr tí av teimum stóru atkvøðuskjunum, sum ikki fekk fólk á ting.

Tað atti at verið heilt óneyðugt at siga tað – men, tað tykist kortini at vera neyðugt at siga tað: Tað er av størsta tydning, at tey, sum fólksins vegna sita ovast í umsitingini – landsstyrisfólkini – eiga at vera bugvin fólk, sum hava førleika og rættu royndirnar til at umsita málaski sini. Er tað altið so í Føroyum?

Undir teirri gomlu skipanini tá landsstyrið alt tók allar avgerðir í felag, bar tað til hja nyggjum fólki at eygleiða tey, sum havdu drugvari royndir í politikki, og spakuliga at læra av teimum.

Men, soleiðis er ikki í dag, nu vit hava fingið ráðharrastyrið. Nú eru landsstyrsfólkini heldur ikki undir somu lon. Nú hava tey fingið munandi meira vald og skulu tí vera fullbugvin frá fyrsta degi. Júst hvat tí førleikakravini skulu vera, er ikki lætt at siga. Men politiskar royndir, fakligur førleiki og royndir innan umsiting eiga at vera sjálvsagd krav. Tað er ikki neyðugt at vera cand. ditt ella cand. datt – tí tu kanst ikki læra til at verða klokur – antin ert tu tað, ella ert tu tað ikki.

Við at læra kunnu vit fáa eina rúgvu av vitan, sum er hæði neyðug og nyttug. Men fólk við drugvum ella serligum royndum kunnu eisini gera eitt vala arbeiði, hóast tey ikki hava so drugva skulagongd. Tað, sum um ræður, er at hava viðrða fyri arbeiðinum hja landsstyrisfólkunum – og at tað ikki bara er tilvildin, lokalpatriotisk áhugamál, ella partapolitiskt gavumildni, ið eru avgerandi, tá nýggj landsstyrisfólk verða sett.

Samráðingarnar sum nustani hava verið millum landsstyrið og stjórnina, eru just eitt dømi um hetta. Tjóðveldisflokkurin vildi hava Hegna Hoydal til løgmann – hann er væl utbúgvin, men hevur hvørki royndir í løgtinginum ella í landsstyrinum.

Tað sigur seg sjálvt, at danska stjórnin tók Anfinn Kallsberg í nógv stórri alvara sum stjórnar- og samráðingarleiðara, tí maðurin hevur drugvar royndir í føroyskum politikki, bæði í løgtinginum, í tyðandi nevndum og í landsstýrinum. Alt hetta gevur honum eitt innlit og eitt yvirlit, sum yngri maðurin ikki kann hava – hóast hann oivað verður ein finur løgmaður um eini seks ár ella so.

Skulu Føroyar hava framtíð lagaða sum sjálvstøðugt ríki, so er neyðugt at hugsa um fyribrigðið *dygd* innan landsins umsiting – sum er innan ta politisku umsitingina. Eitt nútíðar samfelag krevur professionalismu, annars verður tað meira og meira eftirbátur í altjóða samfelagnum.

Vit kunnu bara tryggja fólkaræðið móti embætisvaldinum, um tey, sum sita a politisku sessunum í landsumsitingini, eru før fyri at tosa við embætisfólkið sum javnlíkar! Landsstyrisfólk eiga ikki at vera -kransakøkufigurar-, -marionettir-, men heldur eiga tey at vera undangongufólk, sum inspirera, sum geva embætisfólkunum íblástur – og fólk, sum eru bugvin til at vera ein støðug aminning um, hvør ið er veruligi harrin í húsinum!

Bergur Jacobsen

Tlf. 311212
Dimmalætting
Fax 310941

Summarnáttin

Summarnáttin kallar øll:
Ver við mær um heiðar.
Kom við niðan á roðandi fjøll,
lit yvir silvitnissund og grønkaðar teigar.
Bergið blátt og hvalvið hátt.
Føroya fagra summarnatt.

Fram við a í dalin inn.
Hvil við bol og kráir.
Friðar mennir tær sál og sinn.
Tigandi vøtnini temja tær tuskandi air.
Spælir a sum lambið katt.
Føroya fagra summarnatt.

Far í lítla bát tin út,
rógv tær fram við landi
Har fjara bæði tin sorg, tin sut,
lotið tær kinir, teg styrkir sum grøðandi andi.
Styrkir teg og gevur matt
Føroya fagra summarnatt.

Komið fram við klettastrond,
lítið yvir havið;
tað giðir land vart sum silkibond,
har sólin dandandi, droymandi fer undir kavið
Dagur fer um havsins gátt.
Føroya fagra summarnatt.

Durva eina stutta stund
bjørg og lynglittir hagar.
Faldaðar blomur a angandi grund
reisa sig aftur, nú livið ur havinum dagar.
Dregur frið sín andadratt
Føroya fagra summarnatt.

M

Tillukku við barninum

Hvørjum leggjardegi gyniskir Dimmalætting foreldrum tillukku við lítla barnini. Ummæli hvussu bara í teksti ella í teksti og myndum. Hetta gera foreldrini sjálvi av. Send brævbjóðan til Dimmalætting, postboks 19, 110 Tórshavn merkt: «Tillukku við barninum», skriva ávsendara, navn og adressu. So eru kunnu senda myndina eftir sum skjótast. Tað er okkara ætlan at fáa mynd í blaðið. Vit skulu hava myndirnar í seinasta lagi fríggjamorgun. Um foreldrini gyniskja tað, kann myndafólk frá blaðnum taka myndina ókeypis. Ring 311212, og vit avtala nærri.